| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 04. juni 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 06/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 04. juni 2009 kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 28. mai 2009 um innkalling til fundar. Talan er um útsetta býráðsfundin frá 28. mai 2009, vísandi til kunngerð frá 25. mai 2009 og teldupost til býráðslmirnar frá 26. mai 2009.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Gordon M. Petersen
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonnni á Horni

Gordon M. Petersen møtti á fundinum sum varalimur fyri Eyðun á Lakjuni, sum heitt hevur á borgarstjóran um at innkalla varalimin vegna tess, at hann verður burturstaddur.

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 27/2009 og 28/2009 vórðu til viðgerðar.

Borgarstjórin fór av fundinum kl. 18.20 og tók varaborgarstjórin Dánjal Vang yvir, tá ið mál nr. 29/2009 kom til viðgerðar.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

## Mál nr. 27/2009.

### Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2008.

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 28. mei 2009 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2008 frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, undirskrivaður av Jógvan Amonsson, statsaut. revisor og Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 28. mei 2009 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara post fyri post og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2008 við broytingum (eykajáttanum).

Roknskapurin vísir ein fíggingartørv upp á *kr. 23.541.608,00*.
Sambært høvuðsyvirliti 3 í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum í árinum:

| | Kontoheiti: | | Roknskapur: | Fíggjarætlan við eykajáttanum | | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Byggibúning | | -3.157.658,00 | -3.191.000,00 | | 33.342 |
| 2 | Kommunal virki | | 1.768.480,00 | 4.816.000,00 | | -3.047.520 |
| 3 | Teknisk mál | | -5.714.287,00 | -4.750.000,00 | | -964.287 |
| 4 | Skúla- og mentamál | | -9.075.935,00 | -8.253.592,00 | | -822.343 |
| 5 | Almanna- og heimsumál | | -13.412.327,00 | -12.316.155,00 | | -1.096.172 |
| 6 | Umsiting | | -5.183.231,00 | -4.912.780,00 | | -270.451 |
| | **Økið 1-6 tilsamans** | | **-34.774.958,00** | **-28.607.527,00** | | **-6.167.431** |
| 7 | Rentukostnaður-netto | | -2.704.450,00 | -2.536.655,00 | | -167.795 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | | **-37.479.408,00** | **-31.144.182.,00** | | **-6.335.226** |
| 1 | Íløgur – studning | | -30.861.558,00 | -25.636.000,00 | | -5.235.558 |
| | **Samanteljing** | | **-68.340.966,00** | **-56.780.182,00** | | **-11.570.784** |
| 83 | Avdráttir av lánum | | -6.335.818,00 | -6.924.000,00 | | 588.182 |
| | **Samanteljing** | | **-74.676.785,00** | **-63.704.182,00** | | **-12.158.966** |
| 86 | Skattainntøkur | | 51.135.176,00 | 49.063.391,00 | | 2.071.785 |
| | **Fíggjartørvur** | | **-23.541.608,00** | **-14.640.791,00** | | **-8.900.817** |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | Fíggjarbroytingar | | 15.041.608,00 | 6.180.000,00 | | |
| | Lántøka | | 8.500.000,00 | 8.500.000,00 | | |
| | **Fíggjarúrslit netto** | | **0,00** | **39.209,00** | | |

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttanir fyri tilsamans kr. 4.005.000,00 í árinum, og eru allar hesar fráboðaðar Innlendismálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 67 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

*Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkar roknskap kommununar fyri 2008. Eykajáttanirnar eru vístar niðanfyri.*

| | **Framdar eykajáttanir:** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Øki** | **Íløgur framdar í:** | | **Upphæddir:** | **Fígging:** | | **Endamál:** |
| 1 | Byggibúning | | **-2.100**.000,00 | Innistandandi | | Íløga |
| 2 | Havnin tilbúgving | | -1.600.000,00 | Innistandandi | | Íløga |
| 4 | Skúlapláss | | -125.000,00 | Flutt millum konti | | Íløga |
| 4 | Ítróttarhøllin | | -180.000,00 | Innistandandi | | RAKSTUR |
| | | | **-4.005.000** | | | |

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. mai 2009 og mælir einm æld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommununnar fyri 2008 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna roknaskapin og grannskoðarafrágreiðingina fyri kommununa fyri 2008 uttan viðmerkingar. (9-0). 4 eintøk av roknskapum og grannskoðarafrágreiðingum vórðu undirskrivað á fundinum.

**<u>Mál nr. 28/2009.</u>**

**Viðv. endurskoðaðari fíggjarætlan 2009**

Ásannandi, at skattainntøkan fyri 4 teir fyrstu mánaðarnar í 2009 ikki svarar til tað inntøkugrundarlag, sum samtykta fíggjarætlan kommununar er grundað á, leggur fíggjarnevndin viðløgdu broyttu fíggjarætlan fyri býráðið til góðkenningar.

Broytta fíggjarætlanin sæst í høgru spaltu í viðløgdu fíggjarætlan fyri 2009, har upprunaætlanin sæst í vinstru spaltu.

Fíggjarnevndin hevur broytt skattagrundarlagið fyri A og B skatt úr kr. 253.725.399 í kr. í kr. 233.000.000 soleiðis, at væntaði kommunuskatturin av A og B skattainntøkum verður lækkaður við kr. 4.455.961, frá kr. 44.220.586 til kr. 39.764.626.
Fíggjarætlanin javnvigar nú við kr.75.211.558 móti kr. 81.448.618 í uppruna ætlanini.

Fíggjarnevndin hevur eisini í samráð við hinar politisku nevndirnar gjøgnumgingið fíggjarætlanina post fyri post og gjørt sparingar í íløgum og rakstri á nærum øllum økjum. Tó eru onkrar kontur hækkaðar og onkrar inntøkukontur eru lækkaðar, sí viðlagda skjal har broytingarnar framganga.

Býráðsleiðslan hevur havt fund við allar stovnsleiðarnar í kommununi, har kunnað varð um ætlaðu broytingarnar. Heitt varð somuleiðis á leiðarnar um at koma við møguligum innanhýsis sparingum. Upplýst varð eisini um gongdina í samfelagnum sum heild og hvussu meint hon rakar kommunalu skattainntøkuna.

Soleiðis fingu øll boð um at spara har tað bar til.

Hjálagda fíggjarætlan við fylgiskjali er viðgjørd á fundi í fíggjarnevndini tann 07. og 28. mei 2009 og mælir nevndin býráðnum til at samtykkja málið.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini. (9-0). Kristina T. Larsen ynskti at fáa niðanfyri standandi viðmerking í gerðabókina, hetta sum grundgeving fyri at taka undir við málinum:
Eg greiði atkvøðu við fyrivarni fyri, at býráðsleiðslan saman við fíggjarleiðaranum og fíggjarnevndini, fremur eitt neyvt og stramt fíggjareftirlit fyri ymisku økini, tí staðfestast kann sambært gókenda roknskapin fyri 2009 (mál nr. 27/2008) fyri løtu síðani, at flestu ásetingar í fíggjarætlanini fyri ymisku deildirnar ikki hildu seg til ásetta karm. Sostatt kann eisini staðfestast, at sitandi fíggjarnevnd fyri

2008 ikki hevur megnað at yvirhildið § 18 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, ið m.a. sigur at "Fíggjarnevndin ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir ella samtyktu eykajáttanir".

**Mál nr. 29/2009.**

**Mál um broyting av byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu.**

Í sambandi við stórar parkeringstrupulleikar á økinum Bjarnavegi og Torkilskróki hevur tekniska deildin gjørt uppskot til parkeringspláss á parti av økinum millum hesar vegir inn frá Bjarnavegi og Torkilskróki. Talan er um økið kommununar á matr. nr. 143au.

Í sambandi við viðgerð av hesum máli møtti Frits Johannesen á fundi við teknisku nevndina tann 19. mai 2009 í samband við at hann arbeiðir við ætlanum um barnalund á hesum øki. Eftir at havafingið greitt frá málinum segði hann seg sinnaðan at tillaga ætlanina sambært hesum.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 19. mai 2009 og mælir býráðnum til, at byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at neyðugur partur av hesum frítíðarøki verður broyttur til vegøki, sí annars fyriliggjandi uppskot frá teknisku deildini, dagfest 27. mai 2009.

Somuleiðis verður umsitingarliga mælt býráðnum til at broyta byggisamtyktina á Hellunum, soleiðis at tann parturin av økinum, sum sparkivøllurin er lagdur á, og sum sambært galdandi byggisamtykt er útlagdur til økið "F" frílendi, verður broyttur til økið "E" Almennir stovnar. Sambært galdandi tekst í byggisamtyktini kann økið verða lagt út sum E-økið, tá ið hetta økið eisini rúmar spæliplássum vm. Tekniska nevndin hevur ikki viðgjørt hetta mál, sí annars skriv frá teknisku deildini, dagfest 28. mai 2009.

Talan er um part av matr. nr. 898, 901, 67a og 74a.

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið aftur í teknisku- og mentamálanevndina, fyri at taka upp fund við Frits Johannesen aftur um økið við Bjarnaveg/Torkilskrók, og leggja alt málið aftur við tilmælum fyri komandi býráðsfund. (8-0).

**Mál nr. 30/2009.**

**Umsókn frá Niels Paula Toftegaard um byggiloyvi til terassu**.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Niels Paula Toftegaard, dagfest 31. mars 2009 um byggiloyvi til terassu vestanfyri sethús hansara á matr. nr. 536 við Kirkjuveg.

Tá ið henda bygging er nærri grannamarki enn 2,5 metrar, er málið tann 16. apríl 2009 sent til grannahoyringar hjá Fuglafjarðar læknadømis sjúkrakassa, sum er eigari av ognini á matr. nr. 535.

Tá ið hoyringsfreistin var úti tann 11. mai 2009 vóru ongar viðmerkingar komnir frá eigaranum av matr. nr. 535.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 19. mei 2009, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært hjáløgdum tekningum.

Undir viðgerðini av hesum máli var Jann Toftegaard ikki á fundinum í nevndini vegna ógjegni.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (7-0). Meðan málið varð viðgjørt var Jann Toftegaard ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 31/2009.**

**Broytan av stuðulspolitikkinum**

Mentamálanevndin hevur á fundi tann 27. mars 2009 viðgjørt broytingar í stuðulspolitikkinum, hetta vísandi til reglugerðina fyri "Stuðulspolitikkinum hjá Fuglafjarðar kommunu", sum samtykt varð á býráðåsfundi tann 24. apríl 2008.

Skotið hevur verið upp at broyta stuðulspolitikkin, og hevði forkvinnan í nevndini til henda fund skrivað uppskot til bræv til ymisku feløgini, sum vanliga søkja pening umframt lýsing at seta í bløðini.

Í tekstinum verður gjørt vart við, at umsóknir hægri enn kr. 10.000,00 skulu verða mentamálanevndini í hendi í seinasta lagi 01. juni í árinum fyri, meðan umsóknir undir kr. 10.000,00 skulu verða mentamálanevndini í hendi í seinasta lagi í mars í árinum fyri.

Motivatiónin er tann, at á henda hátt verður meira rúmsátt at arbeiða yvirskipað hjá nevndini, ístaðin fyri at fáast við umsóknir hvørja ferð. Í viðgerðini kom fram, at 1. mars er rættuliga tíðliga á árinum at seta eina freist, og at á henda hátt verður beint fyri teimum spontanu tiltøkunum. Hinvegin tryggjar hesin leisturin, at breiddin fær stuðul og ikki bert tey, ið søkja fyrst.

Semja varð um í nevndini um, at leisturin skal verða nýttur, og at brøv og lýsingar skulu sendast út. Tó verður freistin fyri umsóknum undir kr. 10.000,00 longd frá 1. mars til 1. apríl. Stuðulspolitikkurin verður at broyta tilsvarandi og verður tikin upp aftur á komandi fundi.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. apríl 2009, har ymisk broytingaruppskot vórðu komin til politikkin, men hildið varð ikki, at tíðin var búgvin til hesar broytingar, og verður stuðulspolitikkurin tikin upp aftur seinni.

Eitt broytingaruppskot varð kortini viðgjørt, og tað varð atr skoyta eina paragraff upp í stuðulspolitikkin viðvíkjandi upphædd og freist. § 29 í kapituli 12 ljóðar soleiðis: "Allar umsóknir størri enn kr. 7.000,00 skulu verða mentamálanevndini í hendi í seinasta lagi 1. juni í árinum fyri.

Mentamálanevndin hevur aftur viðgjørt málið á fundi tann 18. mai 2009, og varð víst til samtykt á fundi í nevndini 15. apríl 2009, um at umsóknir hægti enn kr. 10.000,00 skuldu verða mentamálanevndini í hendi í seinasta lagi 1. juni í árinum fyri, og at umsóknir um stuðul lægri enn kr. 10.000,00 skuldu verða mentamálanevndini í hendi í seinasta lagi 1. apríl í sama ári. Semja varð um í nevndini, at feløggini skuldu fáa boð um hesa avgerð, og at hetta skuldi verða lýst í bløðunum. Hetta sær ikki út til at verða gjøgnumført, helst orkaka av broyttu umstøðunum í mentamáladeildini.

Nevndin mælir býráðnum til, at Kapittul I Endamál grein 2 og 3 verður víðkað soleiðis:

*"§ 2. Umsóknir um stuðul hægri enn kr. 10.000,00 skulu verða mentamálanevndini skrivliga í hendi í seinasta lagi 01. juni árið fyri, tó soleiðis at broytingin kemur í gildi frá 01. juni 2010 galdandi fyri fíggjarárini 2011>".*

*§ 3. Umsóknir um stuðul lægri enn kr. 10.000,00 skulu verða mentamálanevndini skrivliga í hendi í seinasta lagi 1. apríl inniverandi ár, t.v.s. tann 01. apríl 2010 galdandi fyri 2010. Broytingin kemur í gildi frá 01. apríl 2010, eins og § 2.*

Nevndin tók á fundinum eisini avgerð um, at senda skriv til tey feløg, sum vanliga fáa størri játtan enn kr. 10.000,00 um at senda skrivliga áheitan til mentamálanevndina um stuðul fyri fíggjarárið 2010 í seinasta lagi 01. august 2009.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini í málinum. (8-0).

**<u>Mál nr. 32/2009.</u>**

**Reglugerð fyri Umhvørvisnevndina og broytingar í kommunustýriskipanini.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 30. apríl 2009 samtykt "*Reglugerð fyri Umhvørvisnevndina"* við gildiskomu tann 01. mai 2009, sum fyrisitingin hevur gjørt við ískoytum til § 2 við stk. 2. og 3., sum lagdar eru aftrat uppskotinum.

Vísandi til § 5 í reglugerðini, so verður neyðugt at § 28 í Kommunustýrisskipanini verður broytt samsvarandi reglugerðini, og tí verður neyðugt at hava 2 býráðsviðgerðir av broytingini við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Góðkenningin av reglugerðini tann 30. apríl 2009 kann verða nýtt sum grundarlag fyri 1. viðgerð, og tí verður neyðugt at hava 2. viðgerð av broytingini á komandi býráðsfundi, sum verður hildin hósdagin tann 04. juni 2009, fyri at tað formliga í málinum skal verða komið í rættlag.

Vísandi til omanfyri standandi samtykt, so verður neyðugt at broyta "**6. part aðrar nevndir**" § 28 soleiðis (uppskot):

**Ráðgevandi Umhvørvisnevndin**

1. þetti. Ráðgevandi Umhvørvisnevndin hevur 3 limir.
2. þetti. Nevndin viðgerð og tilmælir eftir áheitan frá býráðnum/føstum nevndunum tey mál og kærur, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um umhvørvisvernd, náttúrufriðingarnevnd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa, og kann nevndin um

neyðugt skipa fyri arbeiðum/tiltøkum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi eftir nærri avtalu.

3. þetti. Reglugerðin, sum samtykt er av býráðnum tann 30. apríl 2009, verður eftir 01. mei 2009 galdandi fyri nevndina og nevndararbeiðið annars.

Annars skal verða viðmerkt, at ískoytissamtyktin, sum býráðið hevur gjørt til reglugerðina neyvan er í samsvari við galdandi reglar á økinum, tá tað annars er býráðið ella yvirligjandi nevndir, sum hava høvuðsábyrgdirnar av umhvørvismálum.

Tað eru hesi forum sum hava havt heimildir til um neyðugt at beina mál til undirliggjandi nevndir eitt nú til Ráðgevandi umhvørvisnevnd til ummælis.

Sum støðan er nú við góðkenningini av § 2, stk. 3 og 4, so hevur nevndin fingið víðkaðar heimildir, har nevndin kann javnsetast við yvirliggjandi fastar nevndir, og tað er ikki júst tað, sum Kommunustýrisskipanin leggur upp til, ei heldur Umhvørvislógin ella Umhvørviskunngerðin.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna broytingini í 6. parti aðrar nevndir § 28 í kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu um ráðgevandi umhvørvisnevndina. (8-0).

**<u>Mál nr. 33/2009.</u>**

**Viðvíkjandi húsaognini á matr. nr. 599 í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Fuglafjarðar kirkju og Missiónshúsinum Thabor, dagfest 25. mars 2009, hvar greitt verður frá at hesi við testamenti hava arvað ognirnar eftir Solberg Christiansen, sála, og eru ídag skrásettir eigarar av ognunum.

Á felagsfundi millum kirkjuráðið og stýrið fyri Thabor varð samtykt tikin um at selja ognirnar, og í fyrstu atløgu at bjóða Fuglafjarðar kommunu at keypa ognina matr. nr. 599 við ábygdum sethúsum.

Um kommunan er áhugað í at keypa ognina, vilja eigararnir fegnir koma á fund við kommununa um víðari viðgerð av málinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 07. mei 2009 og varð nevndin samd um at mæla býráðnum til ikki at keypa ognina, grundað á at tað ikki er fíggjarligt grundarlag kommunalt fyri at keypa sethús og ognir annars.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um ikki at keypa ognina við grundgevingum nevndarinnar. (7-0). Meðan málið varð viðgjørt var Gordon M. Petersen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 34/2009.</u>**

**Leigumál við P/F Havsbrún fyri matr. nr. 239y á havnarøkinum**.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Havsbrún, dagfest 30. apríl 2009 um keyp av bygningum á ogn kommununar á matr. nr. 239y á havnarøkinum í Fuglafirði frá P/F K.J. Hydraulik, har keyparin ynskir, at eitt møguligt leigumál verður galdandi fram til 30. juni 2016.

Verandi leigumál við P/F K.J. Hydraulik er sambært leigusáttmálanum við kommununa galdandi fram til 30. juni 2012.

Við viðgerðini av leigumálinum við K.J. Hydraulik í 2007 var býráðið av teirri meining, at eitt leigumál fyri lendið matr. nr. 239y bert skuldi verða galdandi 5 ár frá 01. juli 2007 til 30. juni 2012, og hevur kommunala fyrisitingin í telduposti til P/F Havsbrún, dagfestur 28. mai 2009 boðað frá hesi niðurstøðu, so umsitingarliga verður hildið fast við, at leigumálið, um hetta verður latið P/F Havsbrún ikki kemur at vara longur enn galdandi leigusáttmáli sigur, t.v.s. 30. juni 2012.

Býráðið kemur at taka endaliga støðu til leigumálið á fundi 04. juni 2009.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna leigumál við P/F Havsbrún í sambandi við yvirtøku av bygningum á matr. nr. 239y frá 01. juli 2009 til 30. juni 2012, sí § 1. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.30.

Dánjal Vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Gordon M. Petersen

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen